## NØVN Í VIKUNI



### Jógvan Adolf Johannesen 65

Í dag, 20 juli, verður Jógvan Adolf Johannesen, fyrrverandi lærari og løgtingsmaður, Skopun, 65 ár.

Jógvan Adolf er ættaður úr Dali, hann er sonur Sofus og Fridu Johannessen, sum bæði vóru úr Dali.

Jógvan Adolf tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1962 og hevur hann verið lærari í Rituvík 1962-68 og í Skopun frá 1968-97, og frá 1970 sum fyrstilærari.

Hann fór úr starvi 1. august 1997. Jógvan Adolf var á ársskeiði á Fróðskaparsetri Føroya 1967-68 í føroyskum máli og bókmentum, hann hevur eisini verið á ymsum skeiðum í at undirvísa seinmentum næmingum. Hann var skrivari í Skopunar bygdarráð 1971-92.

Í 1988 fór hann upp í landspolitikk, tá hann varð valdur á ting fyri Javnaðarflokkin fyri Sandoyar valdømi, og sat hann á tingi til 30. apríl 1998. Sum tingmaður var hann m. a. limur í Norðurlandaráðnum frá 1992-1994. Mentanarhugaður, sum hann er, var hann limur í løgtingsins mentannarnevnd.



### Kári P. Højgaard 50 ár

Í morgin verður Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy, 50 ár.

Kári gjørdist løgtingsmaður 26. februar í ár, tá Sámal Petur í Grund gjørdist landsstýrismaður og tá varð noyddur at leggja tingsessin frá sær.

Kári P. Højgaard er føddur á Strondum. Hann er sonur Meinhardt og Jenny Højgaard, og er giftur við Simonu, dóttir Borghild og Anisetus Eliasen í Fuglafirði.

Kári tók realprógv á Glyvrum í 1967. Hann var sjómaður frá 1967-1971. 1. august 1971 gjørdist hann avgreiðslupostboð, og yvirpostboð í 1976. Hann hevur verið býráðslimur í Runarvíkar kommunu síðani 1988.

### Árni Joensen fimmti

Hósdagin fylti verkfrøðingurin og fyrrverandi KÍ-formaðurin, Árni Joensen, fimmti.

Árni Joensen er gerðamaður. Hann er sonur Poul Joensen, Poul í Nirðristovu, sum í mong ár var skúlatænari í Klaksvík, og Janu, sum var ættað av Uppsølum. Nú eru longu fleiri ár síðani, at tey bæði fóru foldum frá.

Árni er giftur Rannvá, sum er ættað úr Haraldsundi og av Norðtoftum. Tey keyptu fyri fleiri árum síðani húsini, sum Petra og Hugo Gardar bygdu og búðu í úti á Heygum. Umframt at vera karmur um



familjulívið hjá Petru og Hugo, var avgreiðslan hjá P/F Hugo Gardar og DFDS í Klaksvík eisini í mong ár í kjallaranum í húsunum.

Klaksvíkin er nógv vaksin seinastu hálvu øldina, og tí eitur tað ikki longur, at húsini standa úti á Heygum. Nú standa tey á horninum millum Heygavegin og Gerðagøtu, og har búgva Árni, Rannvá, og tvíburðagenturnar Jana og Sússana, og eisini vitjar sonurin Ragnar, sum er komin til mans, av og á.

Árni er verkfrøðingur og hevur í sínum dagliga yrki fingist við nógvar stórar uppgávur. Millum annað eigur hann æruna av vakra umhvørvinum kring Christianskirkjuna, eins og hann hevur sín leiklut í arbeiðinum við lendingunum í Fugloy og Svínoy.

Árni Joensen hevur verið virkin í nevndini í Klaksvíkar Ítróttarfelag. Hann var skrivari frá 1989 til 1992, so var hann næstformaður í 1993, og frá 1994 fram til 1997 var hann formaður í KÍ.

# Týr besti føroyski bólkurin

**Týr er tann føroyski bólkurin, sum hevur klárað seg best á hitlistanum hjá Útvarpinum, men tað er fittur teinur eftir, um amerikanski bólkurin, Bon Jovi, skal takast**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Ormurin langi er tann sangurin hjá føroyskum bólki, sum hevur staðið seg best á 15 teimum bestu*

Rockbólkurin Týr hevur staðið seg serstakliga væl á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpi Føroya, seinastu vikurnar.

Listin hjá ÚF tekur pulsin millum ungfólk og tónleikaáhugað, og seinastu átta vikurnar hava tey kosið Ormin langa hjá Týr at verða nummar 1. Eingin annar føroyskur bólkur hevur havt ein sang so leingi á toppinum í 15 teimum bestu.

Áðrenn Ormurin langi tók ræðið á 15 teimum bestu, var tað gospel-rockbólkurin, I AM, sum hevði metið. Teirra sangur, Alla leið, var sjey vikur nummar 1 á 15 teimum bestu.

### Bon Jovi nógv bestir

Hóast Týr hevur tikið metið hjá føroyskum bólki, so skal nógv til, áðrenn bólkurin kann taka metið frá amerikanska rockbólkinum, Bon Jovi, sum hevur staðið seg nógv best á 15 teimum bestu.

Teirra sangur, It´s my life, sum varð eitt risahit kring allan heim, var heili 14 vikur nummar 1 í 15 teimum bestu. Næstbesta avrikið á 15 teimum bestu eigur ein annar amerikanskur bólkur. Tað er Aerosmith, sum varð nýggju ferðir nummar 1 við teirra I don´t wanna miss a thing.

15 tær bestu verða sendar í ÚF hvørt leygarkvøld, og um Týr aftur verða á ovastu rók nú leygarkvøldið, so hava teir tikið seg upp á javnt við Aerosmith.

Men eisini eftir tað er langur teinur eftir, um Bon Jovi skal takast.

# West Navion kemur í morgin

**Í morgin kemur stóra oljuboriskipið, sum skal bora fyri BP, í Nólsoyarfjørð**

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*

At oljuvionnan rættuliga er byrjað í Føroyum, sæst á øllum brøgdum.

Í síðstu viku setti boripallurin, Sovereign Explorer, fyrsta borin í í føroysku undirgrundina, og í morgin kemur stóra, norska boriskipið, West Navion, í Nólsoyarfjørð. Hetta er liður í fyrireikingunum til fyrstu boringina hjá á føroyska landgrunninum. BP Amoco Exploration skal bora í økinum, sum hevur nummarið 004.

– West Navion er bygt í 2000 og er eitt av mest framkomnu boriskipum í heiminum, sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum.

Tað er í sambandi við klárgerðina, at skipið verður liggjandi í Nólsoyarfirði leygardagin. Skipið stingur so djúpt og hevur so nógva serútgerð, at tað verður ikki hildið ráðiligt at koma at bryggju.

Av trygdarávum ber tíverri ikki til at lata almenningin koma umborð, sigur Hjarnar Djurhuus.




*Stóra boriskipið, West Navion, sum kemur í Nólsoyarfjørð í morgin*

## Fakta um West Navion

**Longd: 253 metrar**
**Breidd: 42 metrar**
**Hædd 103 metrar**
**Skipið kann bora á 10.000 metra dýpi**



# Konsertir við Gjógv

**Sunnudagin 22. juli vera tvær konsertir norði við Gjógv. Tá fara íslendska Gunnhildur Halla Guðmundsdóttir og føroyingurin Ólavur Jakobsen at spæla**

KONSERT
*Stefan í Skorini*

Í ár eru Summartónar og Norðurlandahúsið farin undir nýtt tiltak við sunnudagskonsertum við Gjógv. Konsertirnar hava samband við tiltakið Summartónar 2001.

Konsertirnar vera í kirkjuni og í bygdarhúsinum. Dagurin er skipaður soleiðis, at klokkan 16 er tann fyrra konsertin í kirkjuni. Um kvøldið er aftur konsert, men hesuferð í bygdarhúsinum. Millum konsertirnar kunnu fólk ganga túr og njóta frálíku náttúruna við Gjógv. Eisini er møguleiki at keypa sær okkurt til matna á vallaraheiminum.

Tann fyrra konsertin, sum er í kirkjuni, er ókeypis, men tann seinna kostar 80 krónur.

### Føroysk verk

Spæld verða fyri tað mesta verk eftir føroyskum tónaskøldum. Á konsertini í kirkjuni fara Gunnhildur og Ólavur at spæla verk eftir Kristian Blak og Trónd Bogason, og í bygdarhúsinum eru tað verk eftir Sunnleif Rasmussen, Kristian Blak og Penderecki, sum eru á skránni.

Gunnhildur Halla Guðmundsdóttir spælir cello, og Ólavur Jakobsen spælir gittar.

Hetta tiltakið hevur verið roynt fyrr. Tað var 24. juni, tá Moyzes kvartettin úr Slovakia spældi við Gjógv. Tá eydnaðist tiltakið avbera væl, og kirkjan, sum tekur eini hundrað fólk, var nærum fullsett, og eini sjeyti fólk vóru á konsert í bygdarhúsinum.

Fyrireikararnir siga, at um undirtøkan verður eins góð hesuferð, so verður talan um at skipa fyri hesum á hvørjum ári.

Skipað verður fyri bussferð til Gjáar í sambandi við konsertirnar, og prísurin er 100 krónur fyri bussin. Til ber at bíleggja pláss í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni.



*Ólavur Jakobsen verður at hoyra í Gjáar kirkju og í bygdarhúsinum sunnudagin*

Danski sonuviðgerðarskúlin svarar:

# Eingin ivi um okkara góðkenning

**Vestegnens Zoneterapeutskole, sum hevur deild í Føroyum, heldur tað vera løgið, at Rás 2 kann siga í eini sending, at teirra útbúgving ikki er nóg góð og ikki hevur nakra góðkenning. Harumframt fílist skúlin á, at ein tilvildarligur sonuviðgeri verður spurdur um hesi viðurskiftini**

SONUVIÐGERÐARSKÚLI
*Stefan í Skorini*

Málið um Vestegnens Zoneterapeutskole í Føroyum heldur fram. Seinasta leygardag var grein her í blaðnum, har Øivind Solbakk, sum hevur ábyrgd av skúlanum fyri sonuviðgerar í Føroyum, fanst hvassliga at Óla Jákupi Rólantson frá Rás 2 og Odu Andreasen, sonuviðgera.

Orsøkin til at Øivind legði eftir teimum báðum er, at tey í eini sending hjá Óla Jákpi Rólantson á Rás 2, hava sagt, at Vestegnens Zoneterapeutskole í Føroyum ikki hevur nakra góðkenning aðrastaðni, og at skúlin ikki gevur sínum næmingum eina nøktandi útbúgving.

Øivind og skúlin, hann umboðar, kenna seg so niðurgjørdar, at hann ætlar at stevna teimum báðum fyri ærumeiðing.

### Skúlans viðmerkingar

Í dagsins blað hevur Vestegnens Zoneterapeutskole, sum Øivind umboðar í Føroyum, sínar viðmerkingar til málið og til sendingina á Rás 2.

Og málið verður ikki umtalað við mjúkum orðum í lesarabrævi.

Skúlin undrast á, at útvarpsstøðin spyr ein tilvildarligan sonuviðgera um viðurskifti, ið snúgva seg um teirra skúla. Harumframt heldur skúlin tað vera ógvuliga løgið, at útvarpsstøðin ikki hevur kannað málið nærri.

– Vit halda, at tað er ræðuligt, at Rás 2 kann siga í eini sending, at okkara útbúgving ikki er góðkend nakrastaðni, at hon ikki er nóg góð og at næmingarnir fáa prógv uppá nakað, ið ikki er nóg gott, sigur skúlastjórin í lesarabrævi.

Víst verður á, at hetta er brot á lógina um ærumeiðing.

Danski skúlastjórin sigur, at hann er góðkendur av fleiri feløgum og sambondum í Noregi og í Danmark. Tey siga, at Øivind Solbakk nýtir tað sama undirvísingartilfarið, sum tey nýta í aðrastaðni. Harumframt er eingin ivi um, at skúlin lýkur treytirnar í sambandi við tímatal, sum Toll og Skattstovan setir.

Skúlin sigur, at hann hevur staðið fyri útbúgving av sonuviðgerum í 15 ár í Danmark, Noregi og í Føroyum. Stjórin á skúlanum slær fast, at henda útbúgvingin er viðurkend og góðkend, og tí kann einki spurnaðartekin setast við hana.


